# Um at rópa uttanfyri

EDMUND JOENSEN
løgtings- og fólkatingsmaður



**Í Fólkatinginum hevur Tjóðveldi tilvitað valt at standa uttanfyri og rópað heldur enn at samstarva. Í Føroyum hevur Tjóðveldi klandrað seg út í andstøðumyrkrið. Kortini vil flokkurin nú brádliga hava realpolitiska ávirkan á politikkin bæði her heima og á Fólkatingi**

Júst í hesum døgum samráðast ábyrgdarfullir politiskir flokkar í Danmark um, hvussu Bankapakki II skal skrúvast saman.

Alheims fíggjar- og búskaparkreppan – sum nú eisini er byrjað at gera um seg í Føroyum – ger tað neyðugt hjá danska statinum at tryggja støðuna hjá fíggjarsektorinum, so hjólini í búskapinum halda fram at mala.

**Trúnaðarsamráðingar**

Higartil hava floksleiðarar og avvarandi ráðharrar saman við forsætisráðharranum viðgjørt støðuna innanhýsis. Siktið er, at fíggjarsektorurin, vinnulív og vanlig fólk skulu fáa best nyttu burtur úr teimum 70-100 milliardum krónunum, ið so ella so skulu veitast peningastovnunum.

Higartil hevur almenningurin frætt lítið frá samráðingunum, og tað er við vilja. Koma upplýsingar út, áðrenn málið er búgvið, ávirkast kursirnir á virðisbrævamarknaðinum, og tað er óheppið.

**Løgmaður hevur sambandið við forsætisráðharran**

Tíbetur er eitt felags fíggjarøki galdandi í Ríkisfelagsskapinum, og tað er orsøkin til, at allir teir føroysku peningastovnarnir fáa lut í Bankapakka I.

Samband er millum løgmann og forsætisráðharran, og tann vegin verða Føroyar tiknar við upp á ráð, nú lógarverkið til Bankapakka II verður smíðað í Keypmannahavn. Nústaðni er tíðin komin til, at fólkatingslimir í semjuflokkunum verða tiknir við upp á ráð.

**Tryggleiki innan Ríkisfelagsskapin**

Hetta er alt, sum tað eigur at vera.

Ríkisfelagsskapurin tryggjar, at peningastovnar í Føroyum kunnu fáa lut í milliardunum frá danska statinum, um peningastovnarnir vilja tað, og gjøgnum lógliga valdu umboð Føroya fer kunning og samskifti fram, ið sjálvandi er í trúnaði.

Tá liðugt er, fer stjórnin at kunna almenningin í Danmark, og landsstýrið fer at kunna í almenningin í Føroyum.

**Geylini úr andstøðumyrkrinum**

Úr føroyska andstøðumyrkrinum hoyrast kortini geyl frá fólki, sum royna at mála eina ranga mynd av støðuni.

Sum ikki einaferð er tað ein limur í Tjóðveldi, ið kemur við atfinningum móti løgmanni og donsku stjórnini.

Bjørt Samuelsen knarrar um, at hon fær onki at vita um Bankapakka II. Eisini hevur hon ilt av, at hon ikki fær ávirkan á, hvussu 70-100 danskar milliardir skulu brúkast. Og í Útvarpinum hendan dagin róði hon fram undir, at bankapakkin eigur kanska ikki at galda fyri føroyskar peningastovnar, um ikki Bjørt Samuelsen og Tjóðveldi fáa ávirkan á hann.

Serliga hetta seinasta sigur nógv um ábyrgdarloysið hjá Tjóðveldi.

Flest øll munnu duga at síggja, at um Føroyar ikki verða fevndar av Bankapakka II, standa Føroyar nógv veikari í altjóða kreppuni.

**Tjóðveldi vil rópa uttanfyri**

Lat meg stutt minna á, at bæði í Føroyum og í Danmark stendur Tjóðveldi uttan fyri realpolitiska ávirkan.

Í Fólkatinginum hevur Tjóðveldi sum strategi at standa uttan fyri og rópa heldur enn at samstarva innanfyri.

Í Føroyum hevur Tjóðveldi klandrað seg út í andstøðumyrkrið. CHE-samgongan skrædnaði, tí samstarv við Tjóðveldi bar ikki til.

Júst í fíggjarmálum arbeiðir Tjóðveldi hart fyri, at Føroyar skulu ikki vera partur av danska fíggjarsektorinum og harvið ikki hava atgongd til donsku bankapakkarnar.

Tjóðveldi vil hava eitt tannleyst føroyskt fíggjareftirlit, hóast føroyski fíggjarsektorurin týðiliga hevur sagt, at tað er alt annað enn skilagott.

**Føroysk áhugamál koma fremst**

Kortini vil Tjóðveldi hava ávirkan á, hvussu danska lógarverkið verður samanskrúvað, og Bjørt Samuelsen vil sanniliga eisini sleppa at gera av, hvussu 70-100 milliardir úr danska statskassanum skulu brúkast.

Eg mundi sagt, at hetta er rættiliga ósmæðið.

Vit, sum fáa ávirkan á Bankapakka II gjøgnum ábyrgdarfult samstarv í Fólkatinginum, fara fyrst og fremst at hugsa um áhugamálini hjá borgarum í Føroyum, tá høvið býðst. Fremsta málið er, at Føroyar skulu standa væl, nú fíggjar- og búskaparkreppa merkist í landinum.

---

bygdin Dar Yassin í 1948 gjørt sáttmála við Haganah, so hon kundi sleppa undan atsókn. Men Haganah sveik hesi fólkini og gav Irgun og tí í síni tíð nazivinarliga Stern-harkaliðnum ta uppgávu at søkja at Dar Yassin. Tann ísraelski søgufrøðingurin Ilan Pappe (hvørs bók *The Ethnic Cleansing of Palestine*, Oneworld, 2006, er støði undir míni frásøgn) greiðir soleiðis frá tí, sum hendi tann 9. apríl 1948:

*Sum teir herjaðu á bygdina, díktu teir jødisku hermenninir húsini undir í maskinbyrsueldi og drópu nógvar av íbúgvunum. Restin av bygdafólkinum bleiv síðani savnað á einum stað og myrd við køldum blóði.*

Fahim Zaydan, sum var tólv ár tá og við sínum egnu eygum upplivdi at síggja sína familju dripna, sigur soleiðis frá:

*Teir tóku okkum út ein fyri og annan eftir; skutu ein gamlan mann, og tá ið ein dóttur hansara fór at gráta, bleiv eisini hon skotin. So róptu teir á beiggja mín Muhammad og skutu hann beint framman fyri okkum, og tá mamma mín stórgrátandi boygdi seg niður yvir hann – haldandi um mína lítlusystir Hudra, sum enn fekk bróst frá henni - skutu teir hana við.*

Tann, sum lesur bókina hjá Ilan Pappe, fær ta fatan, at hesi árini var alt Palestina ein stórur sláktikjallari. Palestinar í túsundatali blivu myrdir, í einari bygd o.u. 40, í eini aðrari um 100, í eini triðju kanska 200. Í bygdini Dawaymeh vórðu 455 fólk saknað, tá ið slátrið var av, teirra millum 170 konur og børn. Menn vórðu stungnir til deyðis, konur brendar livandi, høvdini á børnum blivu sligin, so tey klovnaðu. Og niðurlagið var, sambært eygnavitnum, at hermenninir høvdu "stuttleika" av sínum brøgdum.

Tað ber tí til at siga, at – í ein vissan mun – eru tey fólk, sum nú hava valdið í Ísrael, arvingar bæði eftir eina praksis, eina mentan og eina rørslu, sum eru fascistisk, lutvís nazistisk. Um fyrimyndina og høvuðsprofetin hjá hesum fólkum, Menachem Begin, skrivaðu Albert Einstein, Hannah Arendt og onnur jødisk andsmenni soleiðis í einum brævi í 1948 til New York Times:

*Millum tey mest órógvandi politisku fyribrigdini í okkara tíð er tann "Frælsisflokkur" (Tnuat HaHerut), sum er komin fram í tí nýliga stovnaða ríkinum Ísrael, ein politiskur flokkur, sum í síni skipan, sínum háttalag, síni politisku heimspeki og sínum sosiala atdrátti er nær skyldur ("closely akin") við teir nazistisku og fascistisku flokkarnar...*

Arendt og Einstein vístu her ikki lítið framskygni. Hevur ein hetta søguliga baksýni í huga, er lættari at skilja, hví ísraelar í dag, við heimsins mest framkomnu ræðuvápnum, drepa sivilfólk, menn, konur og smá børn, og uttan fyrilit søkja at skúlum og barnagørðum. Teir gera tað, tí at hetta - harðskapurin, gleðin við at fremja píning og deyða – sum hjá Mussolini og Hitler er eitt endamál og eitt virði í sjálvum sær.

Sara M. Roy, amerikanskur akademiskur granskari, er jøði. Ein stórur partur av hennara ættfólki varð týndur árini 1933-45 av nazistunum. Roy hevur skrivað bøkur og ritgerðir um Gaza og er Gaza-serfrøðingur. Ein av hennara niðurstøðum er, at tann nazistiska framferðin móti jødum og tann ísraelska framferðin móti palestinum eru "út í odd og egg javnlíkar í meginreglu, endamáli og virknaði: at eyðmýkja og avhumanisera" (absolutely equivalent in principle, intent, and impact: to humiliate and dehumanize).

Og her kann vera vert at taka fram ein annan tátt. Tey, sum treytaleyst taka undir við Ísrael, gloyma kanska, at Gaza kann vera eitt tvíeggjað svørð. Tí ein kann illa koma til annað úrslit, enn at framferðin í dag í Gaza ikki bara er ágangur móti einum øðrum fólki, men samstundis ágangur móti jødum: ein framferð, sum kann geva øllum heimsins jødum - og jødadóminum sum hugtaki - banasár.

Ikki bara soleiðis at skilja, at ein dálkandi skammarblettur á henda hátt kann blíva festur – púra órættvíst - á eitt heilt fólk, hvørs einstøku limir ofta als ikki taka undir við Ísraels brotsgerðum ella kanska (sum tey hava fullan rætt til) halda seg langt uttan fyri henda ódámliga, skitna og blóðuga leik.

Men eisini í eini aðrari merking. Eins og islam og kristindómurin ber jødadómurin í sínum holdi, sum søguliga kjølfestu, eina mentan og eina heimspeki. Ein meginstrongur í hesi mentan er hugtakið rættvísi, eitt hugtak, sum glógvar í verkunum hjá jødiskum heimspekingum, rithøvundum, skaldum og listafólkum, eitt nú - fyri bara at nevna nøkur dømir – Maimonides, Spinoza, Disraeli, Kafka, Buber, Arendt, Bob Dylan og Steven Spielberg.

Tað er jødadóminum - í hesum upprunaliga týdningi - sum Mussolinis og Hitlers arvingar, trónandi á Ísraels borgarmúrum við sigursælum og karráum brosum, nú royna av øllum alvi at beina fyri.

